LM-089/2022
Fylgiskjal 7:

FØROYA HANDVERKSMEISTARAFELAG

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Umhvørvismálaráðið
umhvorvi@umhvorvi.fo

Tórshavn 14. marts 2023

Okkara tilv./Our ref.
5843-1811/Mariu/Fxroya-FHMF--H
Tykkara tilv./Your ref.

Hoyringsvar - uppskot til ll um broyting í ll um Húsalánsgrunn

Føroya Handverksmeistarafelag hevur fingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húslánsgrunn til hoyringar.

Føroya Handverksmeistarafelag hevur alment gjørt vart við, at tað er ikki rætt at leigan neyðturviliga verður bíligari, við at Bústaðir ikki longur nýtist at samstarva við privatar aktørar, sum mugu hava fíggjarligt avkast.

Føroya Handverksmeistarafelag vil vísa á, at argumentatiónin í viðmerkingunum fyri at broyta lógina er ógrundað. Tað ber ikki til at grunda lógarbroytingina á, at Bústaðir nú skal fáa møguleika at bjóða bíligari íbúðarleigu. Bústaðir hevur higartil staðið fyri flest øllum verkætlanum einsamalt. Tað er á hendan hátt Bústaðir hevur teir leiguprísir, sum nú einaferð eru. Um man politiskt ynskir lægri leiguprísir, enn teir, sum eru í dag, man tað neyvan eydnast við at fara aftur til ta skipanina, sum hevur havt við sær verandi leiguprísir.

Annars vísir Føroya Handverksmeistarafelag til hoyringssvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Vinarliga
Føroya Handverksmeistarafelag